# Jógvan Arge formaður íMentanarnevndini



Mentamálanenvdin í Tórshavnar býráð hevur á fundi í dag skipað seg við Jógvani Arge úr Tjóðveldi sum formanni og Hallu Samuelsen úr Javnaðarflokkinum sum næstforkvinnu. Hinir nevndarlimirnir eru Jákup Símun Simonsen úr Tjóðveldi, Maria Hammer Olsen úr Javnaðarflokkinum og Annfinn Brekkstein úr Sambandsflokkinum. Mentamálanevndin varar av skúlamálum, barnaansingarmálum, ítróttamálum og øðrum av mentanarligum týdningi í kommununi, her undir bókasøvn og stuðul til mentan.

# »The Gambler« til Føroya

Heimskendi countrysangarin Kenny Rogers kemur til Føroyar at framføra í ítróttarhøllini í Havn páskaaftan 11. apríl. Tað skrivar Dimmalætting í blaðnum í gjár. Sp/F Skot skipar fyri konsertini Kenny Rogers í Føroyum, og tað er fyrstu ferð, at felagið skipar fyri slíkari konsert. Pláss verður fyri umleið 1.650 sitandi áskoðarum.

# Lær at skriva søgur

**Hevur tú hug at royna teg sum rithøvunda, eru góð ráð og snildi at fáa í nýggju *Skrivibókini*, um hvussu tú best fangar lesaran**

NÝGGJ BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Øll eiga eina søgu at siga. Kynstrið er at gera tað soleiðis, at onnur lurta eftir tær ella lesa tekstin hjá tær við áhuga. Í nýggju bókini, *Skrivibókin*, eru stuttligar og hentar skrivivenjingar, har høvundurin, Lasse Ekholm, vísir, hvussu tú fet fyri fet kanst byggja eina søgu upp og skapa eina forvitnisliga frásøgn, sum fær lesaran at brellast eftir meira.




*»Skrivibókin« gevur millum annað nógv góð ráð um, hvussu tú kanst skriva spennandi søgur um egnar upplivingar*

### Byrja við egnum upplivingum

Hevur tú hug at royna teg sum søguskrivara, er ofta best at byrja við tínum egnu upplivingum. Sambært rithøvundanum Lasse Ekholm finnast tínar bestu søgur nevniliga inni í tær sjálvum, tí tú hevur sjálvur verið við í søgunum. Tað eru túsundtals hendingar, sum tú veitst meira um enn øll onnur í allari verðini. Hóast onnur hava verið við, hava tey helst ikki upplivað tað, sum hendi, á sama hátt sum tú.

Tá ið tú skrivar um tínar egnu upplivingar, kenslur og tankar, kanst tú skriva við einari innliving, sum ger lesaran forvitnan. Einstakar løtur, tá ið vit hava verið ovurfegin, sorgarbundin, óð, óttafull ella vónsvikin, minnast vit ofta alt lívið.

Somuleiðis tá ið vit hava gjørt okkum fyri skommum ella hava gjørt okkurt, sum vit kunnu vera errin av. Løtur, sum eru fullar av kenslum, eru góðar at skriva um. Tær kunnu gerast ein stutt yrking við nøkrum fáum reglum ella eitt íkast til eina longri søgu - ella kanska eina heila bók.

### Royndur høvundur

Soleiðis sigur svenski rithøvundurin Lasse Ekholm, sum hevur skrivað *Skrivibókina*, um tað at skriva søgur. Hann er royndur rithøvundur og hevur skrivað ein hóp av ungdómsbókum. Bæði stuttligar, dramatiskar og lættlisnar bøkur. Hann veit, hvussu tú kanst fáa fastatøkur á lesaranum, og so dugir hann ógvuliga væl at greiða frá og leggja øðrum lag á. Til dømis er vælumtókta ungdómsbókin *Idolens hemlighet* úrslit av einum skriviverkstaði, har Ekholm skrivaði bókina saman við 500 ungfólkum á internetinum

*Skrivibókin* er ikki endaliga uppskriftin uppá, hvussu tú gerst heimskendur rithøvundur, men er meira ætlað sum ein spennandi handbók og leiðvísari til teirra, sum ganga og spæla sær við tankan um at skriva søgur. Í bókini vísir høvundurin serliga á eina røð av snildum, sum ein góður rithøvundur eigur at duga. Her lærir tú teg, hvussu tú skrivar soleiðis, at tú kveikir áhugan hjá lesaranum og heldur hann fangaðan frá byrjan til enda. Tú lærir, hvussu tú skalt lýsa fólk, støð og upplivingar soleiðis, at lesarin sær alt samalt fyri sær. Í bókini vísir Lasse Ekholm eisini nógv dømi um, hvussu tú finnur tey áhugaverdastu evnini til tínar frásagnir.

### Úrslit av skeiðum

Bæði í Svøríki og Noregi er tað síðan í sjeytiárunum vorðið siðvenja, at rithøvundar saman við lærarum og næmingum skipa fyri stuttum skeiðum um skriving. Høvuðsinnihaldið í *Skrivibókini* er vorðið til á sovorðnum skeiðum, sum svenski rithøvundurin Lasse Ekholm saman við lærarum hevur hildið fyri næmingar úr øllum Svøríki.

*Skrivibókin* kom fyrstu ferð út á svenskum í 1996 og er síðan týdd til grannamálini og endurprentað fleiri ferðir. Beinraknu og skemtiligu myndirnar hevur navnframa svenska listakonan Christina Alvner teknað.

Jákup í Skemmuni hevur týtt *Skrivibókina* til føroyskt. Forlagið Nýlendi gevur út, og bókin fæst nú í bókabúðunum kring landið.

## Skrivibókin

***Skrivibókin* er býtt upp í 16 kapitlar:**
**Nøkur góð ráð - At lýsa søgufólk - At lýsa støð At lýsa hendingar - At lýsa mót og vegamót - At skriva samrøðu - At skapa myndir við orðum - At finna rætta orðið - At snikka ein tekst til - Hvat skal eg skriva um? - Nøkur skrivispøl - Orðaputl - At skapa langar søgur - Nú ella tá? - Hon ella eg? - At kveikja lesarans forvitni - Snávingarsteinar.**



*Sangbólkurin "Kata" við Katrinu Petersen, Unn Patursson, Eyð Berghamar Jacobsen og Annu Maria Olsen verður við á musikandaktini í Hoyvíkar kirkju komandi mánakvøld*

# Musikkandakt í Hoyvíkar kirkju

**Nýtt tiltak við lestri og tónleiki byrjar í Hoyvíkar kirkju mánakvøldið**

TÍÐINDI

Musikkandaktin er eitt nýtt tiltak, sum varir umleið ein hálvan tíma, har meginparturin er tónleikur, men har ein lítil andakt við lestri úr Halgubók eisini verður hildin.

Komandi mánakvøld verður tað sangbólkurin "Kata", sum stendur fyri tónleikaliga partinum. Við í bólkinum eru sagnarinnurnar eru Katrina Petersen, Unn Patursson, Eyð Berghamar Jacobsen og Anna Maria Olsen. Allar eru tær virknar sum solistar í ymsum høpi, og tær hava nógvar royndir innan kórverðina. Á musikkandaktini mánakvøldið fara tær at syngja bulgarskan tónleik. Orsøkin til, at tær hava valt at syngja bulgarskar sangir, er, at harmoniirnir, klangurin, rytmurnar og søgurnar skapa eitt heilt serligt og spennandi ljóðunivers. Hetta ger sangin til eitt øðrvísi upplivilsi enn tann vanliga føroyska kórsangin

Musikkandaktin verður mánakvøldið 19. januar frá klokkan 20.30 til 21. Tiltakið er ókeypis og øll eru vælkomin.

-ave-